| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 10. desember 2009 |
| Býráðsfundur nr. | 13/2009 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2009 tann 10. desember kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 04. desember 2009 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Gordon M. Petersen
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eldevig
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Bjørghild Arnholdtsdóttir

Eyðun á Lakjuni hevur boðað borgarstjóranum frá, at hann hevur forfall til fundin. Gordon M. Petersen møtti sum varalimur fyri Jann Toftegaard, sum boðað hevur borgarstjóranum frá, at hann vegna umstøður ikki kann møta á fundinum, somuleiðis sum áheitan varð latin um at kanna varalimin inn.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 64/2009.**

**Viðvíkjandi ásetan av almennum býráðsfundum fyri 2010.**

Fuglafjarðar býráð hevur móttikið skriv frá borgarstjóranum, dagfest 04. desember 2009, hvar skotið verður upp, at almennu býráðsfundirnir fyri 2010 verða hildnir hesar hósdagar kl. 16.30 í býráðssalinum:

28. januar, 25. februar, 25. mars, 29. apríl, 27. mai, 24. juni, 26. august, 30. september, 28. oktober, 25. november og 16. desember.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við uppskotinum frá borgarstjóranum um ásetan av almennum býráðsfunduim fyri 2010. (8-0).

**Mál nr. 65/2009.**

**Viðvíkjandi nýtslu av Luffustovu.**

Nú umsorganararbeiðið (dagtilhaldið) er flutt úr Luffustovu yvir í Lonina, hevur leiðarin á sosialu deildini uppskot um, at børn við serligum tørvi, sum ganga á dagstovninum, kunnu hava atgongd til Luffustovu.

Á dagstovninum eru børn, sum ikki klára at vera millum so nógv børn allan dagin, og hevur stovnurin spurt um okkurt stað at fara við einum tveimum ella trimum børnum, har tey kunnu eta matpakka, lesa eina søgu og annars talast við okkurt fyri at fara á stovnin nakrar tímar seinni.

Hetta er fyri stovnin ein afturvendandi trupulleiki ikki at kunna fara avstað við børnum, sum hava trupult við at innordna seg í stórum bólkum. Ynskiligt hevði verið at brúkt miðhæddina í Luffustovu til endamálið, sum er hugnalig og ikki so stór.

Í løtuni er eingin avgerð tikin um at seta húsini til sølu aftur.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í sosialu nevndini tann 30. november 2009 og tekur nevndin undir við uppskotinum og heitir á býráðið um at bíða við at selja Luffustovu, til ein varandi loysn er funnin á hølum til børn við serligum tørvi-

**Avgerð:**
Tilmæli frá sosialu nevndini varð samtykt við tí ískoyti, at um so verður, at Luffustova verður lýst til sølu, so verður ein avgerð um hesi viðurskifti fráboðað sosialu deildini/nevndini í góðari tíð frammanundan. (8-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.45.

Dánjal Vang

Gordon M. Petersen

Elisabeth D. Eldevig

Kristina Toftegaard Larsen

Petur Abrahamsen

Magnus Midjord

Bjørghild Arnholdtsdóttir

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen